# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Hans Petur Djurhuus, Selatrað** fer til gravar úr Selatraðar kirkju fríggjadagin 1. september kl. 14. Tey, ið vilja minnast Hans Petur, kunnu lata Selatraðar kirkju eina gávu. Konta í peningastovunum.

**Petur Müller í Kvívík** andaðist mánadagin 28. august á Ellisheiminum í Vágum, 81 ára gamal. Kistan fer frá Ellisheiminum í Vágum hósdagin klokan 17. Jarðarferðin verður úr Kvívíkar kirkju fríggjadagin klokkan 14. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Petur, kunnu lata Kvívíkar kirkju eina gávu.

**Karl Anton Klein** fer til jarðar úr Vestmanna kirkju hósdagin 31. aug. kl. 14. Tey, ið vilja minnast Karl Anton, kunnu lata eina gávu á konto í Føroya Banka.

†

Kunngjørt verður fyri ætt,vinum og kenningum, at okkara elskaði maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Petur Müller**

Kvívík

andaðist 28. august á Ellisheiminum í Vágum
81 ára gamal.
Farið verður frá Ellisheiminum í Vágum hósdagin kl. 17.00.
Jarðarferðin verður úr Kvívíkar kirkju, fríggjadagin kl. 14.00. Sungið verður úr sálmabókini.

*Fyri tey avvarðandi*
**Ebba**
**Ansa, Helga og Fríða**

Tey, ið vilja minnast Petur, kunnu lata Kvívíkar kirkju eina peningagávu.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri sýnda samkenslu, tá ið góði samstarvsfelagi og vinur okkara

**Ib Jensen**
Tórshavn (føddur í Thy)

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til øll, sum mintust hann við at lata gávu til innsavningina.
Hjálpsemi.
Tøkk fyri uppringingar og fyri á ein hvønn hátt sýnda samkenslu.
Tøkk til øll, sum við jarðarferðina og ervið vóru við til at minnast Ib Jensen.

*Vegna tey avvarðandi og Adventistasamkomuna*
**Jens Vilhelm Danielsen**

# Skúlaheimið 30 ár



*Skúlaheimið 30 ár, f .v.: Egon Øregaard, skúlastjóri, Rannvá Hansen, leiðari á Skúlaheiminum, Sólrun Gray, starvsfólk, Tina Joensen, starvsfólk, Óluva Sundsker, starvsfólk, Oda Hansen, starvsfólk, Randi Ziska, starvsfólk, Anne Lisa Davidsen, starvsfólk, Kartni Olsen, húsavørður, Reynhold Madsen, kokkur, og Ninna Antoniussen, starvsfólk*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Mikudagin 30. august eru 30 ár liðin síðani Skúlaheimið hjá Tekniska Skúla í Tórshavn varð tikið í brúk í 1976.**

Hetta var fyrsta byggistigið av nýggjum tekniskum skúla í Tórshavn. Ætlanin var at byggja sjálvan skúlan á sama øki, men sum kunnugt bleiv hetta ikki til nakað, men ístaðin vóru fýra hallir bygdar fyrst í 80-unum í Smiðjugerði við Velbastaðvegin.

Tað var Palli Gregoriussen arkitektur sum teknaði Skúlaheimið. Miðskeiðis í 90-unum varð Skúlaheimið renoverað við t.d. nýggjum taki, klædningi og vindeygum.

Leiðari á skúlaheiminum er Rannvá Hansen.




*Upprunaliga tekningin av Skúlaheiminum, har tekniski skúlin eisini var ein partur av byggiætlanini*

## Tøkk

Eg takki øllum, sum mintust meg á 80 ára degi mínum við blómum, gávum og heilsanum annars.
Takk øll somul.

**Hanna Lisberg**

**Dagurin í morgin**
**31. august. Berta.** Ókend halgikvinna. Summar halgisøgur siga, at talan er um ta vøkru Bertu, sum umvendi mann sín, kongin Edelbert í Kent í Onglandi. Týskt navn, ið merkir hin bjarta. Janus Djurhuus doyði hendan dagin í 1948.

Internet Sosialurin